FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

**Tórshavn**, 26. september 2017

**J.Nr.:** 17/00353-5

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 122 frá 21. august 2017, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 29.** Til skattskylduga inntøku teljast ikki:<br>...<br>13)<br>a) Avlamisviðbót eftir § 2, grundupphædd av fólkapensjón eftir § 2, eyka viðbót eftir § 2, stk. 4, avlamisveiting eftir § 8 a, barnaviðbót eftir § 10, hjálpar- og røktarviðbót eftir § 11, persónlig viðbót eftir § 12 og aldursviðbót eftir § 45 í løgtingslóg um almennar pensjónir o.a. | **1.** § 29, nr. 13, litra a verður orðað soleiðis: ”a) Grundupphædd av fólkapensjón eftir § 2, stk. 1, nr. 1, grundupphædd av fyritíðarpensjón eftir § 2, stk. 1, nr. 2-4, avlamisviðbót eftir § 2, stk. 3, eyka viðbót eftir § 2, stk. 4, avlamisveiting eftir § 8 a, barnaviðbót eftir § 10, hjálparviðbót og røktarviðbót eftir § 11, persónlig viðbót eftir § 12 og aldursviðbót eftir § 45 í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.” |
| *3. Stk.* Munurin millum álíknaða kommunuskattin og tað, sum hin skattskyldugi skal gjalda sambært 2. stk., verður goldin kommunukassanum av landskassanum, soleiðis at kommunan fær álíknaða kommunuskattin, tó hægst 11 % av skattskyldugu inntøkuni. | **2.** § 47, stk. 3 verður orðað soleiðis: “*Stk. 3.* Munurin millum álíknaða kommunuskattin og tað, hin skattskyldugi skal gjalda sambært stk. 2, verður goldin kommunukassanum av landskassanum soleiðis, at kommunan fær álíknaða kommunuskattin. Er frádrátturin hægri enn samanlagdi lands- |

| | |
|---|---|
| | og kommuskatturin, verður munurin goldin avvarðandi skattgjaldara mánaðarliga.” |
| | **§ 2**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2018. |